# Skála heldur fast

**Við einum 2-0 sigri á TB heldur Skála fast í oddasessinum hjá sær.**

FORMULADEILDIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Skála var greiður favorittur undan dystinum á Fjarðastevnu, og teir livdu eisini upp til favorittheiti hjá sær.

### Løgdu bragdliga fyri

Tá ið liðini bæði hittust á Skála í fyrsta umfarinum av Formuladeildini, vunnu skálamenn ein sannførandi 5-1 sigur, og tvøramenn vildu fegnir vaska lemjandi ósigurin av sær sunnudagin.

Tað gjørdu teir eisini í ein ávísan mun, tí avrikið hjá TB var munandi betur sunnudagin, enn tað hevði verið í fyrra dystinum. Hóast Skála legði bragdliga fyri og legði seg á odda heilt tíðliga í dystinum, so fall TB ikki í fátt, og gestirnir høvdu eisini onkran møguleika at koma upp á javnt.

Fyrsta málið kom longu, tá ið seks minuttir vóru spældir av dystinum. Skálamenn spæla seg fram eftir vøllinum, og teir koma ígjøgnum úti í høgru síðu. Bólturin verður lyftur heilt yvir um TB-málið, og við handaru stong er Hanus Thorleifsson hægstur og setur krúllin undir bóltin, og so er 1-0.

Bæði liðini royndu at skapa nakað fram eftir vøllinum, og hóast tað var Skála, sum hevði bóltin mest, so vóru tvøramenn ikki heilt vandaleysir, og teir kundu havt javnað fyri steðgin. Hinvegin hevði Skála eisini sínar møguleikar at økja um leiðsluna, men tá ið farið var til hálvleiks stóð framvegis 1-0 til heimaliðið.

### Fyrimyndarligt uppspæl

Eftir steðgin hevði Skála greitt munin á tvøramonnum, og teir spældu bóltin runt sínamillum uttan stórvegis hóvasták.

Trúfasta áskoðarafjøldin hjá heimaliðnum noyddist tó at bíða rættuliga leingi eftir at síggja Skála sláa sigurin fastan, tí seinni hálvleikur var gott og væl hálvrunnin, áðrenn tað hendi.

Heimaliðið byggir eitt álop upp í høgru síðu, og spakuliga verður álopið flutt longur og longur inn eftir vøllinum. Bólturin endar heilt yviri í hinari síðuni, har vongurin sendir bóltin væl inn fyri málið hjá TB. Jonhard Frederiksberg er fyrstur á bóltinum, men hóast Predrag Markovic fær hendurnar á bóltin, missur hann onkursvegna royndina hjá Jonhardi inn í málið, og so var dysturin avgjørdur.

Við sigrinum á TB heldur Skála fast í oddasessinum hjá sær, og vinnar teir móti EB/Streymi í seinasta umfarinum fyri steðgin, sum verður komandi sunnudag, kann Skála halda summarfrí á fremsta plássinum.

Tvøramenn skulu tvær ferðir í dyst í vikuni. Útsetti dysturin móti GÍ verður annaðhvørt mikukvøldið ella hóskvøldið, og í vikuskiftinum skulu teir spæla móti arvafíggindunum úr VB.



*Nógvir harðir og kontantir dystir vóru um miðvøllin, tá ið Skála sunnudagin vann 2-0 á TB á Fjarðastevnu á Skála.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FAKTA**

**Skála-TB 2-0 (1-0)**
1-0 Hanus Thorleifsson 6.
2-0 Jónhard Frederiksberg 70.

**Skála:** Vlada Filipovic – Bárður Danielsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Iulian Florescu – Bjarni Jørgensen, Pætur Dam Jacobsen, Pauli G. Hansen, Hanus Thorleifsson (Jenel Gorgunaru 86.) – Bogi Gregersen (Arnold Berg 78.), Jónhard Frederiksberg (Sveinur Justinussen 86.).
**TB:** Pedrag Markovic – Pedrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Birgir Rasmussen (Dan Mortensen 46.) – Allan Poulsen (Einar Petersen 59.), Aleksander Jovevic (Hallur Christianen 71.), Bárður Dimon, Jón Johannesen – Olivur Abrahamsen, Emmanuel Larby.
**Gult kort:** Emmanuel Larbi.
**Dómari:** Dagfinn Olsen.

# Gongur av skriðuni hjá KÍ

**Tað gongur einki hjá klaksvíkingum í Formuladeildini. Leygardagin høvdu teir vitjan av B36, og úrslitið gjørdist sætta tapið á rað hjá KÍ.**

FORMULADEILDIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fortreytirnar hjá KÍ undan dystinum leygardagin vóru annars toluliga góðar, tí tilfarið, ið venjarin Oddbjørn Joensen hevði at ráða yvir til dystin, var tað frægasta, ið hann hevur havt í síni tíð sum venjari hjá klaksvíkingum. Hinvegin vóru klaksvíkingar fullvæl greiðir yvir, at tað var eitt tað sterkasta liðið í landinum, sum kom á vitjan.

### Gekk javnt á

Tað gekk annars rættuliga javnt á í dystinum norðuri í Klaksvík. Í mun til fleiri av undanfarnu umførunum stóðu klaksvíkingar rættuliga væl á vøllinum, og teir fingu eisini onkrar einstakar málmøguleikar.

Hóast B36 er oddalið, so hevur tað víst seg, at tað gongur ógvuliga striltið hjá havnarliðnum at spæla seg til opnar málmøguleikar. Soleiðis var eisini í Klaksvík, har tað enn einaferð var staðfest, at B36 fær alt ov lítið burtur úr sínum vongspæli.

Hinvegin dugdu havnarmenninir væl at revsa mistøkini, sum KÍ gjørdi, og tað kostaði klaksvíkingum dýrt. Annar av klaksvíkingunum í B36, Allan Mørkøre, legði gestirnar á odda, tá ið fyrri hálvleikur var ein góðan hálvan tíma gamal.

KÍ missur bóltin í uppspælinum, og B36 fer avstað við bóltinum á høgra vongi. Bólturin verður sendur innfyri, og har er Allan Mørkøre fyrstur á og potar í netið til 1-0.

Dysturin var rættuliga tættur, men hóast KÍ kanska hevði teir størru møguleikarnar, so tóktist tað tó allatíðina sum um, at B36 hevði tamarhald á støðuni, og at tað bert var ein spurningur um tíð, áðrenn gestirnir punkteraðu dystin.

Tað gjørdu teir, tá ið okkurt um eitt korter var eftir at spæla. B36 vinnur bóltin eftir eitt KÍ-innkast, og teir gera skjótt av fram eftir vøllinum. Fróði Benjaminsen sleppur at renna inn móti málinum, og úr spískum skýtur hann bóltin millum beinini á KÍ-málverjanum, Karstin Joensen, og so var 2-0.

Eitt sindur av dramatikki var eisini í dystinum. Fyrst fekk Kenneth Jacobsen hjá B36 beinleiðis reytt fyri at siga okkurt við dómaran, og nakað seinni var Høgni Madsen hjá KÍ rikin av vølli fyri eina at síggja til ikki serliga grova takling.

### Oddbjørn framvegis venjari

Eftir dystin leygardagin fór tað at ganga sum rótasúpan, at KÍ-venjarin, Oddbjørn Joensen, hevði sagt seg úr starvinum, men hesum vísa bæði KÍ og Oddbjørn sjálvur aftur.

KÍ fekk í farnu viku ein danskan spælara, Mathias Tauber, til hópin hjá sær, men danin valdi eftir bert fimm døgum í Føroyum at stinga í klæðsekkin og fara aftur til Danmarkar uttan at hava spælt ein einasta dyst.

B36 fór leygarkvøldið til Íslands, har teir skulu fyrireika seg til UEFA-Cup dystin móti ÍBV úr Vestmannaoyggjunum. Uppgerðirnar móti ÍBV eru ein tann besti møguleikin hjá einum føroyskum liði at vinna seg víðari í evropeiskum kappingini, og spennandi verður at fylgja havnarliðnum.

**FAKTA**

**KÍ-B36 0-2(0-1)**
0-1 Allan Mørkøre 32.
0-2 Fróði Benjaminsen 75.

**KÍ:** Karstin Joensen - Leon Bjartalíð, Niclas Niclasen, Jan Andreasen, Harley Bertholdsen(Kristoffur Jacobsen 75.) - Høgni Madsen, Jan Joensen, Atli Danielsen - Arnhold Joensen, Heðin á Lakjuni, Hjalgrím Elttør(Ove Nysted 64.)
**B36:** Jákup Mikkelsen - Kenneth Jacobsen, Klæmint Matras, Pól Thorsteinsson, Alex José dos Santos - Ingi Højsted, Fróði Benjaminsen, Mikkjal Thomassen (Niels Joensen); Bergur Midjord (Óbi) - Allan Mørkøre, Levi Hanssen (Wellington).
**Gult Kort:** Niclas Niclasen - Ingi Højsted
**Reytt Kort:** Høgni Madsen - Kenneth Jacobsen
**Dómari:** Eiler Rasmussen